# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Torradagar komnir fyri at verða

**Við væl vitjaðu Torradøgunum í Klaksvík í farnu viku, hevur tiltakið prógvað sítt haldvirði, heldur mentanarleiðarin í Klaksvíkar Kommunu, Dávur Winther. Verður tað upp til hann, er tiltakið komið fyri at verða**



Risafrímerki afhjúpað í Klakksvík

Heimsins stærsta frímerki var afhjúpað utan á pósthúsinu í Klakksvík í Færeyjum í gær. Það er stækkuð útgáfa af frímerki sem gefið verður út í tilefni af 100 ára afmæli bæjarins.

„Það er mær ein stór gleði at verða við til hesa hátíðarløtu og at fáa høvi til at avdúka hetta nýggja frímerkið," sagði Steinbjørn Jacobsen bæjarstjóri við tilefnið. aij

*Íslendska Morgunblaðið bar eisini tíðindini um heimsins stórsta frímerki, sum varð avdúkað í Klaksvík fyrsta Torradagin*

TORRADAGAR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Annað árið á rað vórðu sonevndu Torradagarnir hildnir í Klaksvík í farnu viku. Í mun til í fjør, var tiltakið munandi víðkað hesuferð. Samanlagt góvu mongu tiltøkini eina fjøltáttaða lýsing av bæði teimum umstøðum, ið vinnulívið og serliga fiskivinnan virka undir og av trivnaðinum hjá Klaksvíkingum innan hesar karmar.

At Torradagarnir fevndu so breitt hesuferð gjørdi sítt til, at sera nógv fólk hava vitjað ella verður partur av tiltøkunum. Tí er gott støði lagt undir, at Torradagirnir eru komnir fyri at verða, heldur Dávur Winther, mentanarleiðari hjá Klaksvíkar Kommunu.

## Umhvørvið og heilsa

Við lívinum hjá sjómonnunum sum útgangsstøði, byrjaði Torravikan við fyrilestrum um viðurskifti, sum ikki minst ávirka fiskivinnuna. Serfrøðingar røddu um veður og vind, fiskidagaskipan, veðurlagsbroytingar og dálking. Og til hvørt av hesum tiltøkum, var nógv gjørt burturúr at lata sjófólkið sleppa framat við spurningum, egnari vitan og hugleiðingum.

At umhvørvið eisini ávirkar okkara heilsu, munnu tey flestu verða greið yvir. Júst hvørji ítøkilig spor, eitt dálkað umvørvi kann seta likamliga, fingu fólk møguleika at kanna í Skálanum leygardagin, har tað millum annað bar til at máta lungaorku. Sera nógv fólk vóru til tiltakið í Skálanum, har fyrireikararnir nýttu høvi at markera Klaksvík sum Heilsubý.

## Til Íslands og aftur

Eisini landafrøðiliga rukku Torradagarnir út um heimlig mørk. Sum kunnugt byrjaði Torravikan við avdúkingini av 100 ára frímerkinum hjá Klaksvíkar Kommunu. Og longu dagin eftir bórust tíðindini um frímerkið, ið sigst vera heimsins størsta í íslendska Morgunblaðnum.

Sjálvir góvu íslendingar eisini sítt íkast til fjølbroyttu Torravikuna, tá mentanarleiðarin í Kópavogi helt fyrilestur á serligum Íslandskvøldi í býráðhøllini í Klaksvík. Hetta kvøldið var eisini høvi at hoyra íslendskar klaver- og violinsnillingar framføra klassiskan tónleik.

## Lippur og leikur

Hóast veðrið ikki var av tí besta í Torravikuni, høvdu nógv fólk aðrastaðni frá leitað sær til Klaksvíkar hesar dagarnar.

Sambært Dáva Winther, høvdu heil ferðaløg ymsastaðni frá sett stóran part av degnum av til Torratiltøkini. Fleiri áv teimum nýttu høvi at royna serliga hagreiddu Torra-lippurnar, sum ein matstova í Klaksvík borðreiddu við fyri síðani at enda dagin við at uppliva sjóleikin Sjóvvevur um Ainu Cederblom.



*Korosh Taheri, medisinskur yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, gav góð ráð um heilsugóðan mat*



Netbanki - tá tíð og hugur er til tess



Við netbanka-loysnini hjá Skjern Bank kanst tú keypa og selja virðisbrøv tá tú hevur tíð og hug.

Set teg í samband við Gunnar Streymoy og fá meira at vita.

Gunnar Streymoy
Íløguráðgevi
Tlf. 516227
gst@skjernbank.dk

www.skjernbank.dk
SKJERN BANK



*»Húsið« hjá teimum ungu í Klaksvík setti eisini sín dám á Torradagarnar. Her eru tað Lív Næs og Jan á Líðarenda, sum framføra á Kafé LadyBug í Húsinum*



*Eisini eldra ættarliðið hevði leitað sær niðan í Skálan at kanna heilsustøðuna*